# Dagmar fekk váttan fyri fíggingini

**Fyrrverandi nevndarformaðurin í Faroe Seafood vil ikki hava sitandi á sær, at Dagmar S. Joensen í sínum skrivi sigur, at teirra boð upp á Fiskasøluna ikki hevði hald í veruleikanum**

DAGMAR-MÁLIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Tað er tann svartasta lygn, tá Dagmar Joensen staðfestir, at fíggingin til ætlaða keypið av Fiskasøluni ikki var í lagi.

Soleiðis sigur Hákun Steingrímsson, táverandi nevndarformaður, sum saman við øðrum á Fiskasøluni gjørdi eina roynd at keypa virkið á heysti 2004.

Í brævinum, sum Dagmar S. Joensen tann 10. apríl sendi løgmanni, verður millum annað ført fram, at talan ikki var um verulig boð, sum komu upp á Fiskasøluna og Fiskavirking.

Eitt brot í drúgvu frágreiðingini ljóðar soleiðis:

»Hvussu nógvur eginpeningur er aftanfyri ella um fígging, spyr eingin. Men síðani tá hava Bjarni Djorholm, Jørgen Niclasen, Heðin Zachariassen, fjølmiðlar og onnur endurtikið hesi sokallaðu "boð", lagt afturat og drigið frá eini herferð móti nevndini í Framtaksgrunninum, og tí sølutilgongd nevndin setti í verk samsvarandi leiðreglunum hjá Føroya Landsstýri«‹

### Dagmar átti sjálv orðingina

Men hetta vil fyrrverandi nevndarformaðurin ikki hava sitandi á sær.

– Vit fingu brádliga at vita, at ætlanin var at leggja Fiskasøluna og Fiskavirking saman. Sjálvir hildu vit tað vera skilabetri, um Fiskasølan varð rikin fyri seg, og tí løgdu vit eitt boð inn.

– Fíggingin til hetta mátti fáast til vega yvir eitt vikuskifti, men vit megnaðu so at skava nakað saman, og tí fóru vit á fund við grunnin.

– Og tað einasta, sum vit her fingu at vita, var, at okkara boð var ov lágt.

– Vit spurdu enntá eisini Dagmar, um hon var nøgd við dokumenteraðu fíggingina. Tað var hon partvíst, men hon vildi ynskt, at okkurt varð øðrvísi formulerað. Tí ringdu vit í bankan, soleiðis at Dagmar Joensen sjálv slapp at diktera, hvat skuldi standa í brævinum, og fáar minuttir seinni hevði hon brævið. So tað er als ikki í tráð við veruleikan, tá hon fleiri ferðir í sínum skrivi endurtekur, at fíggingin hjá okkum ikki var í lagi. Hon var í lagi, og tað páhaldið kann dokumenterast, slær Hákun Steingrímsson fast.

### Skuldi forða samanlegging

Í skrivi sínum til løgmann sigur Dagmar S. Joensen, at hetta »boðið« saman við »boðnum« upp á Fiskavirking høvdu eitt greitt sikti – at forða fyri eini samanlegging.

Boðið hjá leiðsluni á Fiskasøluni fyri virkið var um 45 mió kr. Boðið, sum ein bólkur av reiðarum gav upp á Fiskavirking, var tá um 115 mió kr. Boðini vórðu tó vrakað, og samanleggingin gjøgnumførd. Í vár seldi Framtaksgrunnurin 68% av samanlagda Faroe Seafood. Keypspeningurin fyri hesi 68% var um 75 mió kr.



*Fyrrverandi nevndarformaðurin sigur, at Dagmar S. Joensen ikki sigur sannleikan, tá hon førir fram, at teirra boð upp á Fiskasøluna ikki var eitt veruligt boð*

Høgni Hoydal:

# Ivist um løgmað endurvinna trúv

**Formaður Tjóðveldisfloksins heldur ikki, at løgmaður hevur skilt hvat tað merkir at hava eina eftirlitsskyldu í landsins hægsta embæti. Harnæst ivast hann eisini í, hvussu Jóannes Eidesgaard kann endurvinna sítt trúvirði sum løgmaður**

LØGFRØÐILIG KANNING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, segði við Sosialin í gjár, at Jóannes Eidesgaard hevði avsagt alla rættartrygdina hjá borgarunum, við sínum útsagnum í sjónvarpinum mánakvøldið, har løgmaður segði, at hann vildi síggja ítøkiliga dokumentatión, áðrenn hann fór at gera nakað sum helst við málið.

Hetta segði løgmaður klokkan átta mánakvøldið, men 16 tímar seinni kúvendur hann, tá hann á miðdegi týsdagin sendir út tíðindaskriv, har hann boðar frá, at hann setir eina løgfrøðiliga kanning í verk.

Spurdur um, hvat hann heldur um, at løgmaður nú setir eina kanning í verk, er Høgni Hoydal ikki lítið bersøgin. – Jóannes Eidesgaard er eftir mínum tykki vassaður so mikið langt út, at eg ikki dugi at síggja, hvussu hann kann endurvinna sítt trúvirði sum løgmaður, sigur formaður Tjóðveldisflokksins.

Í viðmerking til Sosialin í gjár, segði løgmaður, Jóannes Eidesgaard, at hann ikki metti seg vera trýstan í nakran hátt, til at seta kanningina í verk. Hesar útsagnir heldur formaður Tjóðveldisfloksins lítið um, tí sambært Høgni Hoydal, so var løgmaður trýstur av anstøðuflokkunum og landsstýrismálanevndini at handla í málinum.

Løgmaður hevur nú avgjørt at seta eina kanning í verk. Men hetta er ein máti hjá løgmanni at vinna sær tíð í, soleiðis at málið kann leggja seg, vil Høgni Hoydal vera við.

### Dagmar uppiborið rós

Tá Høgni Hoydal verður spurdur um, um hann hevur nakað boð uppá, hvussu arbeiðssetningurin hjá løgfrøðiliga bólkinum, ið skal gera kanningina, skal ljóða, sigur Høgni Hoydal, at hann ikki metir málið at vera løgfrøðiligt í so máta. – Spurningurin er ikki løgfrøðiligur, men heldur er tað ein spurningur um løgmaður hevur skilt hvat tað merkir at hava eina eftirlitsskyldu í landsins hægsta embæti, og tað haldi ikki at hann hevur, heldur formaður Tjóðveldisfloksins.

– Hinvegin haldi eg, at tey fólkini, sum nú hava trakkað fram í málinum hava rós uppiborið. Klagan frá Dagmar til løgmann, er fyrsta dømi har ein borgari setur orð á tær fólkafloksmetodirnar, sum vit altíð hava kent, og sum vit brúktu ómetaliga nógva orku at forða fyri í farnu samgongu, staðfestir Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins.



*Høgni Hoydal heldur, at løgmaður fær ilt við at endurvinna sítt trúvirði, nú hann er vassaður so mikið langt út í málinum*

# Høgni krevur svar

**Løgmaður má svara fyri, um hann hevur fjalt sannleikan og valdsmisnýtsluna hjá Djurholm, sigur Høgni Hoydal í viðmerking, sum varð send føroysku miðlunum týskvøldið**

DAGMAR-MÁLIÐ
*Jákup Mørk*

Tíðindaskrivið, sum Høgni Hoydal sendi, er soljóðandi:

»Avdúkingarnar um valdsmisnýtsluna hjá landsstýrismanninum í vinnumálum mótvegis Framtaksgrunninum eru so greiðar, at løgmaður sjálvsagt langt síðani átti at havt tikið avleiðingarnar mótvegis varaløgmanni sínum. Men løgmaður hevur lopið undan, og hevur ístaðin kravt prógv frá teimum, ið hava verið fyri órætti. Alment hevur hann sagt, at hann tók málið upp í 2004 og at rímiligur friður hevur valdað síðani tá kring Framtaksgrunnin.

Eftir trýst frá andstøðuflokkunum roynir løgmaður í dag at bólta rút og tosar um at gera løgfrøðisligar kanningar.

Men í Dimmalætting í kvøld vísir fyrrverandi formaðurin í Framtaksgrunninum, Dagmar Joensen, á, at løgmaður hevur verið persónliga kunnaður um framferðarháttin hjá Bjarna Djurholm bæði í 2005 og í 2006. Eisini beint upp undir søluna av United Seafood, tá formaður og nevndarlimir aftur vórðu trýstir og skiftir út. Løgmaður gjørdi onki við málið og hevur sambært hesum ikki sagt sannleikan um sín leiklut í málinum.

Løgmaður hevur sambært stýrisskipanarlógini evstu ábyrgd av fyrisiting landsins og hevur vegna borgaran eftirlit við, at landsstýrismenn umsita lógliga og fullgott. Hevur løgmaður vitað um valdsmisnýtslu og hevur hann enntá fingið áheitanir frá ábyrgdarpersónum um at taka neyðug stig, men hevur onki gjørt, so er tað løgmaður, ið hevur trupulleikan og ábyrgdina av viðurskiftunum.

Valdsmisnýtslan grevur alla rættartrygd burtur og hon kann hava kostað Framtaksgrunninum og samfelagnum stórar upphæddir. Hetta er so mikið álvarsligt, at tað nú er løgmaður, ið má svara fyri sín leiklut og síni ábyrgd í hesum máli.

Ella ætlar løgmaður at seta løgfrøðingar at kanna seg sjálvan?«